## Leita eftir bjarnum

Ta seinastu vikuna hava íslendingar fingið drúgva umrøðu kring heimin, tí teir valdu at skjóta tvær hvítabjarnir, sum eftir øllum at døma høvdu svomið úr Grønlandi til Norðurlandið í Íslandi. Serliga djóravinir hava fýlst á, at báðar bjarnirnar blivu skotnar. Hesari umrøðu vilja íslendingar fegnir sleppa undan, og tí ætla teir ikki, at nøkur bjørn skal koma aftur til lands, uttan at teir vita av tí. Tí heldur sjóverjan nú eftirlit við leiðini norðanfyri.



*Hetta er tann seinna bjørnin, sum kom til Íslands*

*(Mynd: Vísir)*

## Mennast tíðliga

Íslendsk børn og ung verða fyrr sjálvstøðug enn børn og ung í øðrum londum í Vesturheiminum, og tey eru eisini skjótari at taka vinir fram um síni næstu skyldfólk. Tað er ein av niðurstøðunum í einari stórari kanning, sum Háskúlin á Akureyri hevur verið við til at gera. skrivar Vísir. Kanningin vísir eisini, at íslendskar gentur eru skjótari at royna kynslívið enn gentur í øðrum londum, men í so máta eru íslendskir dreingir sum dreingir í øðrum londum.

# ra í hundarnar



*Fyrrverandi reiðarin, løgtingsmaðurin og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum er ikki samdur við teimum sum siga, at myndugleikarnir bara skulu leggja allan fiskiflotan í hendurnar á marknaðarkreftunum*

lond hava konjuktur-javnandi tiltøk, tá upp-ella niðurgangstíðir eru, tí hetta kann byrgja uppfyri, at kreppur gerast ov djúpar og umfatandi fyri eitt samfelag.

- Í sínari tíð læt tað almenna ymiskan stuðul til fiskivinnuna, og sum tíðin leið, hildu politikarar, at alt hetta var av tí illa. Í dag vilja politikarar als ikki tosa um stuðul, tí mett verður, at slíkt hava vit roynt áður. Men so svart ella hvítt er samfelagið ikki skrúvað saman.

Olaf Olsen heldur, at grøvin, har myndugleikarnir als ikki vilja tosa um at byrgja uppfyri kreppu, tá konjukturir broytast, kann vera eins djúp og hin, har alt tóktist bera til.

- Tann stóri trupulleikin við kreppuloysnum er, at myndugleikarnir ofta hava lyndi til at lata hesar standa við ov leingi - eisini eftir, at brúk ikki er fyri teimum meira.

Fyrrverandi reiðarin ásannar, at tað er sjáldan, at tað skeiva, sum stuðlstíðin verður rópt, bara er skeivt - og at tað »rætta«, bara er rætt.

- So einfalt er samfelagið ikki skrúvað saman.

Olaf Olsen vísir á, at lógin um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum var góð, tá hon kom, og hon hevði eisini sín týdning, sum árini gingu.

- Men at lógin slapp at hanga við fleiri ár ov leingi, sigur ikki, at hon ikki hevði sín týdning tey árini, hon tænti sínari søk.

### Mest banala

Fyrrverandi reiðarin heldur, at tosið um fríu marknaðarkreftirnar er eitt tað mest banala, tú kanst hoyra frá landsins myndugleikum.

- Eg haldi tað avgjørt ikki vera rætt, at allur fiskiflotin nú sleppur at fara í hundarnar, sigur Olaf Olsen.

# slands við gulllaksi

Hinvegin fær manningin ikki minni burtur úr einum slíkum túri sum hesum.

Hann sigur, at meðan gulllaksaprísurin í Føroyum liggur millum 3,40 og 3,60 krónur fyri kilo, fær Vestmenningur helst einar 3,80 krónur fyri kilo á Hornafjørðinum.

- Men prísurin veldst eisini um kursin á dollaranum, leggur hann aftat.

Tummas Christophersen, sum eisini er ein av eigarunum av nýggja gulllaksavirkinum í Vestmanna, sigur, at Atlantis kann frysta eini 60-70 tons um samdøgnið.

Í Leirvík hevur nógv verið at gjørt, síðan gulllaksavertíðin byrjaði, og har hava tey arbeitt við fleiri vaktum.

- Tá hvørki av virkjunum kundu keypa lastina hjá Vestmenningi, gjørdu vit av at fara til Íslands, sigur hann.

Spurdur, hvussu gulllaksatíðin higartil hevur roynst hjá partrolarunum, sigur reiðarin, at einki er nóg gott í løtuni, sum hann tekur til.

- Skal lønandi rakstur vera, er neyðugt at fiska nógv og skjótt alla tíðina, soleiðis at oljunýtslan verður minst møgulig, sigur Tummas Christophersen.

Í Sosialinum í gjár spáddi reiðarin í Vestmanna, at fáir ísfiskatrolarar sigla um tveir mánaðir, um fyritreytirnar ikki broytast.



*Longsta dag - 21 .juni - verða nógv áhugaverd tiltøk á Svangaskarði*

# B68-dagur á Svangaskarði

**Nógv ymisk og áhugaverd tiltøk verða á skránni, og eitt nú fer gullliðið hjá B68 (1992) at spæla steypadyst móti NSÍ-liðnum, sum spældi hetta sama árið**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tofta Ítróttarfelag skipar leygardagin fyri B68-degi á Svangaskarði.

Endamálið við degnum er at savna pening inn til virksemi felagsins, samstundis sum fólk fáa eitt hugnaligt upplivilsi á Svangaskarði.

Ein skrá er løgd fyri dagin, sum byrjar klokkan 11 leygarmorgunin við tilmelding til stuðulsrenning og innlatan av teknaðum stuðulsbløðum. Eisini ber til at tekna stuðulsbløð á Svangaskarði beint fyri renningina.

### Hans Pauli hitar

Tað verður Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, sum klokkan 11.30 byrjar dagin við upphiting á grasvøllinum.

Sjálv renningin byrjar klokkan 12. Okkurt leskandi verður ta næstu løtuna, og kastað verður eisini lut um gávukort, sum verður latið í sambandi við stuðulsrenningina.

Klokkan 15 verður fótbóltsdystur millum B68 og TB, 1. deild (menn), og klokkan 17.30 verður áhugaverdur steypadystur millum gullliðið hjá B68 (1992) og NSÍ-liðið, sum spældi hetta árið.

### Tiltøk í tjaldi

Tofta Ítróttarfelag hevur leigað nýggja tjaldið hjá Bátafelagnum, og hetta verður karmur um fleiri av tiltøkunum allan leygardagin. Í tjaldinum verður eitt nú loppumarknaður, mattombola og tónleikur, og eisini verður skipað fyri fótbóltskapping fyri børnum.

Felagið tekur fegið móti lutum til loppumarknaðin.

Frá klokkan 17 seinnapartin leygardagin kunnu fólk keypa sær góðar B68-búffar við eplum og grønmeti í tjaldinum.

Stóri B68 dagurin endar við dansi, sum byrjar klokkan 23 við 18 ára aldursmarki.

Tofta Ítróttarfelag vónar, at nógv fólk fara at vitja niðan á Svangaskarð leygardagin.

